# Fiskivinna á sjógvi og landi

Í komandi **Oyggjablaði** seta við sjóneykuna á føroysku fiskivinnuna. Lesið í blaðnum millum annað hetta:



- **Uttan fiskivinnuna steðgar alt upp**



- **Hirtshals riggar til føroyskan útflutning**
- **Brestir besta skip í fjør**



- **Nógvur fiskur í Sørvági**



- **Rak í bjargingarbáti í eitt samdøgur**





- **Hvalspýggja søkti bát**

**og mangt annað**

# Menninir bjargaðir

## Manningin á Ametyst gjørdu eitt megnar arbeiði, tá ið teir bjargaðu manningin á línubátinum Oddny sunnunáttina, sigur Robert Olsen, stjóri á Sjóbjargingarstøðini

Randi Jacobsen

Ein línubátur er nú minni í flotanum, tí sunnunáttina sakk Oddny nakað norður úr Nakkinum.

Um sjey tíðina leygarkvøldið sendi línubáturin Oddny út neyðarkall. Teir vóru staddir tígggju fjørðingar norður úr Nakkinum, og báturin var farin at leka.

Tað var vánaligt veður, og veðurforsagnirnar vóru ikki góðar.

Fleiri skip vóru nærindis, og næstur var trolbáturin Ametyst, sum beinanvegin fór at sigla til Oddny.

Ametyst var bara einar fimm fjórðingar frá, og hann var tí skjótt á staðnum.

Tað eydnaðist at fáa teir tríggjar menninar umborð á Ametyst, sum royndi at seta fast á Oddny, men endin slitnaði.

So kom Triton til og tók yvir uppgávuna at halda eyga við Oddny.




*So er Oddny ikki til longur*

### Sakk

Tá ið klokkan var 02.10 sakk Oddny.

Robert Olsen, leiðari á MRCC rósar manningini á Ametyst fyri gott arbeiði hesa náttina. Veðrið var vánaligt, men teir fingu kortini menninir av Oddny í øllum góður.

Støðan umborð á Oddny var alt annað enn góð. Teir varnaðust lekan so seint, at einki var at gera. Ljósið umborð fór, motorurin steðgaði, og skipið bara rak. Teir høvdu bara fartelefonir at samskifta við.

Menninir høvdu latið seg í yvirlivilsisdraktir og gjørt klárt at fara í bjargingarbát, men av tí at Ametyst kom til hjálpar, var hetta ikki neyðugt.

MRCC bílegði tyrluna, men líkindini vóru vánalig. Tað gjørdist tó ikki neyðugt hjá tylruni at gera nakra roynd.

Ametyst fór inn á Klaksvík við monnunum.

Oddny varð smíðaður í 1947. Eigari var K.M. Sp/F í Klaksvík.

# Norðurlendsk bókasavnsvika

**BÓKASAVN** Tríggir av fremstu norðurlendsku rithøvundunum hava skrivað tekstirnar, ið verða lisnir upp í bókasavnsvikuni í ár. Tað eru John Ajvide Lindqvist (Svøríki), Lene Kaaberbøl (Danmark) og Andri Snær Magnason (Ísland).

Eirikur Lindenskov

Norðurlendska bókasavnsvikan verður hildin 8.-14. november, og verður fyriskipað av Norrønu feløgunum í samstarvi við bókasøvn. Hetta er størsta tiltakið við upplestri í Norðurlondum, og millum tey størstu í heiminum. Síðsta ár høvdu yvir 2000 bókasøvn og skúlar upplestur samstundis úr teimum somu norðurlendsku tekstunum. Upplesturin fer fram í átta norðurlendskum og baltiskum londum.

Evnið í ár er »Gandakendu Norðurlond« og kastar ljós á ævintýrsøgur, ræðusøgur og magiska realismu í Norðurlondum.

Tekstirnir, ið valdir eru til tey vaksnu, eru brot úr fyrndargomlu *Vøluspá* úr eldru *Eddu* og brot úr svensku metsølubókini *Låt den rätte komma in*.

Tey ungu hoyra brot úr heimskendu donsku ævintýrsøguni *Dóttir Skammarans*, meðan børnini hoyra brot úr nútímans íslendsku søguni *Søgan um bláa knøttin*.

Felags fyri rithøvundarnir í ár er, at allir hava útgivið heimskendar metsølubøkur.

John Ajvide Lindsqvists hevur skrivað ræðusøguna *Låt den rätte komma in*, og hon er útkomin í 30 londum og er eisini filmatiserað. *Dóttir Skammarans* eftir Lene Kaaberbøl er vorðin kult millum fjepparar av ævintýrsøgum yvir allan heimin, m.a. í Japan, og *Søgan um bláa knøttin* eftir Andri Snær Magnasons er týdd til 12 ymisk mál. Fjórði teksturin er *Vøluspá* úr eldru Eddu.

Bókasøvn, skúlar og feløg kunnu melda seg til at hava upplestur ella onnur tiltøk á heimasíðuni www.bibliotek.org.

Øll, sum melda seg til, fáa ókeypis plakatir og postkort, ið íslendska Sól Hrafnsdóttir hevur málað.

Tað ber eisini til at taka tekstirnar og hugskotsskrá niður frá heimasíðuni, sigur Landsbókasavni.

## Misti jarn í rundkoyring

Fríggjadagin slitnaði stroppurin á einum treylara, sum var staddur í rundkoyringini við SMS, og óhappið kundi havt álvarsligar avleiðingar, um fólk vóru fyri. Av lastini datt nógv tungt jarn.

Nú er tað upp til løgfrøðingarnar, um treylaraførarin skal skuldsetast fyri brot á ferslulógina.

## Funnu amfetamin

Hetta vikuskifti vóru politistar úti í býnum í Havn og leitaðu eftir sterkum rúsevnum millum ungfólk.

Ein ungur maður varð tikin við einum lítlum grammi av amfetamini í lummanum. Tað var pakkað í smærri posar, klárt til at selja. Nøgdin svarar, sambært politinum, til tríggjar ella fýra rúsir.